# Útbjóðingarskriv

Rammusáttmáli – teldur

19. juni 2026

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

## Útbjóðandi stovnur

Gjaldstovan
Kvíggjartún 1
160 Argir
Telefonnummar: 352400
Kontaktpersónur: Hallur Thomsen, deildarleiðari
www.gjaldstovan.fo

## 1. Inngangur til útboðsmannagongd

Gjaldstovan (eftir hetta "Útbjóðari") vil við hesari áheitan geva tykkum møguleikan at bjóða upp á at fáa rammusáttmála til landsins keyp av teldum. Rammusáttmálan umfatar ikki tilhoyrandi kt-útgerð – tað kemur í rammusáttmála fyri seg.

Útboðið verður framt sum eitt alment útboð sambært rundskrivi nr. 9000 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum. Tær formligu reglurnar í hesum útboði viðvíkjandi innlating av tilboði, samskifti í millum útbjóðara og tilboðsgevara og aðrar upplýsingar eru at finna í hesum útbjóðingarskrivi.

Keyp Landsins hevur tikið stig til at gera ein rammusáttmála til teldur. Allir stovnar landsins hava fingið kunning og møguleika til at verða við í arbeiðinum. Sett er ein dómsnevnd frá Almannaverkinum, Landssjúkrahúsinum, Taks, Apoteksverkinum, Fróðskaparsetrinum, KT landsins og Keyp landsins.

Endamálið við rammusáttmálanum er at spara pengar. Bæði við at fáa vøruna til ein bíligari kostnað, men eisini gjøgnum teir rakstarfyrimunir, sum eru við at standardisera landsins KT umhvørvið. Við at standardisera verður umsiting, trygd og viðlíkahald lættari og harvið bíligari. Tessvegna hava landsins stovnar í felag tikið avgerð um at halda seg til eitt ávíst merki. Hetta skyldast fyrst og fremst ynski um at standardisera landsins kt-umhvørvi. Tað verður mett, at rakstrarligu fyrimunirnir við at halda seg til fáar vørur, eru størri enn tann avsláttur, sum stovnar fáa við at merkir eru í fríari kapping. Harnæst fæst eitt tryggari kt-umhvørvi um vit halda okkum til færri vørur.

Samstundis sum vit ynskja at halda okkum til ávísa vøru, so ynskja vit eisini at fáa ein kappingarføran prís. Fyri at tryggja, at vit fáa kappingarførar prísir, so bjóða vit veitarum at koma við alternativum vørum. Nærri ásetingar eru lýstar í hesum útbjóðingartilfari.

Hetta útboðið inniheldur fylgjandi stig:

1. Útinnan av tilboði: Tilboðsgevari fyrireikar sítt tilboð við støði í útboðstilfarinum, og tilboð skal vera latið inn innan ásettu tilboðsfreist. Í hesum tíðarskeiði kann tilboðsgevari fáa fleiri upplýsingar við at seta skrivligar spurningar.
2. Meting av tilboðum: Útbjóðari letur upp og metir um, hvørt innkomin tilboð eru í samsvar við form- og minstukrøv. Eftir hetta verða innkomin tilboð mett í samsvar við ásettu tillutanartreytirnar.
3. Tillutan av sáttmála: Útbjóðari tekur avgerð um tillutan av sáttmála og kunnar tilboðsgevarum um avgerðina.

## 2. Útboðstilfar

Útboðstilfarið er sett saman av:

- Útbjóðingarskriv
- Upplýsing um prís á teldum
- Fylgiskriv 1 – Yvirlit yvir stovnar
- Fylgiskriv 2 – Trú og heiður váttan.

Útboðstilfarið kann heintast á www.keypsportal.fo.

## 3. Praktiskir upplýsingar

### a. Spurningar

Tilboðsgevari hevur møguleikan fyri at fáa fleiri upplýsingar um útboðstilfarið við at seta skrivligar spurningar. Spurningar skulu vera á føroyskum og sendast til Hall Thomsen á fylgjandi telduposti:

keypsportal@gjaldstovan.fo

Spurningar, ið eru settir áðrenn mánadagin 17. august kl 12.00, verða svaraðir í seinasta lagi seks dagar fyri ásettu tilboðsfreist. Spurningar, ið eru settir eftir freistina fyri at seta spurningar, verða eisini svaraðir í seinasta lagi seks dagar innan ásettu tilboðsfreist, uttan so, at spurningurin er órímiliga tungførur at svara uppá. Spurningar, ið eru settir seinni enn seks dagar undan freistina fyri at lata inn tilboð, verða sannlíkt ikki svaraðir. Spurningar verða svaraðir skrivliga og dulnevnt. Øll svar kunnu síggjast á www.keypsportal.fo í seinasta lagi mánadagin 22. august.

Keyp landsins førir eftirlit um stovnar landsins fylgja hesum rammusáttmála, og Keyp landsins hevur tulkingarrætting, um stovnar landsins skulu keypa eftir sáttmálanum.

## 4. Tilboð

### a. Tilboðsfreist og adressa til innlating av tilboði

Tilboð skal latast inn talgilt til Keypsportalin á fylgjandi teldupostadressu: keypsportal@gjaldstovan.fo

Tilboð kann ikki latast inn á annan hátt. Freistin at lata inn tilboð er: fríggjadagin 28. august 2026 kl 12. Tilboð, ið verða latin inn eftir hesa freist, verða ikki viðgjørd.

### b. Vøru mongd

Stovnar landsins hava eini 3.000-4.000 teldubrúkarar, hetta er ein leyslig meting, men gevur eina ábendingum mongdina av teldum vit keypa árliga. Hvussu nógvar teldur landsins stovnar fara at keypa frameftir, hava vit ikki eitt neyvt boð á. Vit kunnu tó upplýsa, hvat keypt var í 2024. Víst verður til skjal "upplýsing um prís á teldum"

Stovnar landsins verða álagdir at keypa eftir hesum rammusáttmála, sum meginregla. Nakrar vørur eru krøv, meðan aðrar vørur eru sjálvbodnar. Vøra sum er "krav" skal keypast eftir rammusáttmálanum, meðan vøra sum er "sjálvboðin" merkir, at um stovnur hevur tørv á aðrari vøru, sum er øðrvísi, so kann hon keypast aðra staðins. Stovnurin kann ongantíð keypa somu vøru, sum í rammusáttmálanum, frá øðrum veitara.

Gjaldstovan umsitur eisini Skúlanet, og tað er eitt ynski at øll á Skúlanet keypa inn eftir rammusáttmálanum. Fleiri skúlar eru tó kommunalir, og eru tí ikki bundnir av at keypa eftir Keypsrundskrivinum.

### c. Frágreiðing um tilboð og prís

Tann prísur, sum veitarin ynskir at bjóða, skal upplýsast í arkinum "upplýsing um prís á teldum" – veitarin kann eisini lata tilboð inn á annað hátt um hann ynskir – men "upplýsing um prís á teldum" skal verða útfylt.

Um veitarin tekur fyri útkoyring, so skal hetta og treytir fyri útkoyring upplýsast. Fyri at stuðla undir, at stovnar ikki keypa ov smátt inn, sum er tíðar- og orkukrevjandi, fara vit at viðmæla, at veitarin tekur gjald fyri koyring við smákeyp.

### d. Sáttmálalongd og prísvøkstur

Rammusáttmálin skal verða galdandi í 3 ár. Um umstøður tala fyri tí, kunnu partarnir samráðast um ein longri sáttmála enn 3 ár.

Prísvøkstur verður loyvdur, um hann fylgir marknaðargongdini. Veitarin skal fráboða prísvøkstur til Keyp landsins. Um Keyp landsins metir, at prísvøksturin er ov stórur, so kann Keyp landsins velja at uppsiga sáttmálan við 4 vikur freist og fara út í nýtt útboð.

### e. Góðska, tøkni og krøv annars

Við hesum rammusáttmála ynskja stovnar landsins at keypa teldur til ein lágan kostnað. Hetta ynski kemur tó at standa aftanfyri okkara ófrávíkiliga krav um, at teldur skulu verða av hágóðsku. Tað skal skiljast sum, at útgerðin tætt við altíð virkar, er einføld at seta upp, verður mett at halda til okkara nýtslu, er trygg og hevur høga brúkaravinarligheit. Útgerð, sum ikki livur upp til hesi krøv, verður ikki tikin við í metingina.

Tað finnast uttan iva ymiskar góðskur og tøkniligir møguleikar innan tað útgerð, sum vit leita eftir, og tað kann avbjóða dómsnevndina.

Fyri at gera tað einfalt hava vit valt at upplýsa nakrar vørur, sum stovnar landsins hava keypt nógv av. Dómsnevndin hevur mett um hvørja vøru vit ynskja. Har tað beinleiðis er ásett hvørja vøru vit ynskja, skal hetta uppfyllast. Onnur støð hava vit latið tað verða frítt hjá veitarum at bjóða ta vøru fram, sum teir meta er góð nokk. Vit skulu gera vart við, at um vøran ikki livir upp til okkara krøv, so kann tilboðið blíva vrakað.

Tað verður dómsnevndin, sum tekur endaliga avgerð. Avgerðin um góðsku vil byggja á eina meting (subjektiva) frá dómsnevndini. Um ivi er um góðskan livir upp til tær ásetingarnar kravt verður, so kann dómsnevndin biðja um fleiri upplýsingar ella at biðja um at fáa vøruna til royndar. Um ein vøra verður mett ikki at verða egna, so verður hon ikki tikin við.

Tann vøra, sum verður vald, skal við tilboðsinnlating ikki verða fráboðað frá framleiðara at fara úr framleiðslu/sølu í rammusáttmálatíðarskeiðinum.

## f. Goymsla og service

Tað er eitt krav, at veitarin hevur vøruna á goymslu í Føroyum, soleiðis at leveringstíðin svarar til tað, sum er vanligt fyri vøru, sum er á goymslu í Føroyum. Tað er eitt krav, at veitarin kann veita service, so sum ráðgeving um loysn, uppseting/íbinding, feil finning og líknandi. Goymslukrav til sjálvbodna vøru eru minni enn til kravda vøru. Skilt á tann hátt, at vit góðtaka lættari, at ein sjálvboðin vøra má bíleggjast heim, um sølan av henni er avmarkað.

## g. Rokningar og upplýsing

Stovnarnir og veitari samskifta beinleiðis. Stovnar rinda sjálvir fyri síni keyp. Keyp landsins á Gjaldstovuni hjálpir um ivamál eru.

Upplýsingar um rammusáttmálan við prís og treytum verður lagd út á keypsportal.fo – har bert stovnar landsins hava atgongd.

Rokningin skal verða talgild, í vanligum oio-sml format. Útbjóðarin hevur heitt á teir stovnar, sum keypa mest av teldum um at luttaka í einari dómsnevnd. Í dómsnevndini sita umboð fyri Almannaverkið, Landssjúkrahúsið, Taks, Apoteksverkið, Fróðskaparsetrið og KT landsins – umframt Keyp landsins.

## h. Uppsøgn av sáttmála

Sáttmálin kann altíð uppsigast við tríggjar mánaðar freist. Eru avbjóðingar í samstarvinum, so kunnu partarnir avtala styttir freist.

## i. Lata upplýsingar

Veitarin sum vinnur útboðið, bindur seg til at lata Keyp landsins upplýsingar um sølu hjá stovnum landsins, tá Keyp landsins umbiður hesar.

## j. Samráðingar og sáttmáli

Vit ætla ikki, at tað skal verða nakað samráðingarumfar. Útbjóðari kann tó venda sær til tilboðsgevarar við tí endamáli at neyvlýsa innihaldið í tilboðnum, og tá ið hetta ikki elvir til mismun í millum tilboðsgevarar.

Tað vera sostatt ongar sáttmála- ella prís samráðingar í samband við hetta útboðið, og tískil verður heitt á tilboðsgevara um at fyrireika tilboðið soleiðis, at sáttmálin kann undirskrivast á tilboðsskjalinum, har allar treytir í útbjóðingar tilfarinum eru við.

Keyp landsins kann tó samráðast við vinnandi veitaran um at skifta ávísar vørur, so tær hóska betur til tørvin hjá stovnum landsins. Somuleiðis kann Keyp landsins samráðast um at fáa fleiri vørur við í rammusáttmálan – um stovnar landsins umbiðja tað.

Um ein vøra gongur út í tíðarskeiðinum, so kunnu partarnir avtala eina erstatningsvøru ella velja at fara í útboð.

## I. Hagtøl

Gjaldstovan hevur tørv á at fáa upplýst í árliga hvussu stór sparing er í mun til vanligan lista prís. Hendan upplýsing er ikki neyðug at vera í sjálvum tilboðnum, men kann koma aftaná.

## k. Fyrivarni og minstukrøv

Øll krøv í útboðstilfarinum eru minstukrøv. Eitt minstakrav verður skilt sum eitt krav, ið treytaleyst skal lúkast.

Tilboð, ið ikki lúka øll minstukrøv verða burturvíst, men tað verður tó sipað til, at útbjóðari kann venda sær til tilboðsgevarar við tí endamáli at neyvlýsa innihaldið í tilboðnum, og tá ið hetta ikki elvir til mismun í millum tilboðsgevarar.

Tilboðsgevari verður eggjaðir til at seta skrivligar spurningar um ivamál eru í samband við útfylling av fylgiskjølunum.

Tilboð skal latast inn á føroyskum. Tekniskir upplýsingar kunnu verða á donskum ella enskum.

Tilboðsgevarar kunnu ikki hava skuld til tað almenna, vísandi til galdandi reglur.

## l. Freist, ið tilboð skal standa við

Tilboð skal standa við 60 arbeiðsdagar roknað frá ásettu tilboðsfreist.

## 5. Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist. Útbjóðari kannar eftir, um innkomnu tilboðini lúka form- og minstukrøv. Útbjóðari kann, aftaná tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at neyvlýsa innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í samsvar við ásettu tillutarnartreyt.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing av avgerðini, harundir fyrimunir og vansar við vinnandi tilboðnum.

## 6. Meting av tilboðum

Sáttmálin verður tillutaður í samsvar við ásettu tillutanartreytir. Metingin av innkomnu tilboðum tekur støði í fylgjandi undir tillutanartreytum:

1. Prísur 100%

Tann, sum bjóðar eina vøru, sum livir upp til okkara minstukrøv, og sum hevur bíligasta samlaðan prís, har allir kostnaðir eru íroknaðir, fær fult stigatal.

Við tað at vit biðja um prís á ávísum vørum, so ynskja vit at tryggja okkum at vit ikki gerast "locked inn". Vit fara tí at bjóða veitarum at bjóða fram alternativa vøru frá Lenovo ella Dell. Um stovnar landsins skulu skifta til annan av hesum veitara, so skal innkeypsprísurin verða somikið lægri, at munurin millum lægsta HP tilboðið og lægsta Dell/Lenovo tilboðið, stendur mát við okkara skiftiskostna, og at góðskan/tøknin á Dell ella Lenovo teldum er tilsvarandi.

**Skiftiskostnaður** er tann kostnaður av útgerð, sum má skiftast, orsaka av at man skiftir merki. Eitt nú dokkir og tilhoyrandi arbeiðið. Stovnar landsins fara tí at hava ein x % skiftiskostnað. Um eitt alternativ tilboð er bíligari enn x%, so kunnu vit skifta yvir til alternativa tilboðið. X% skiftiskostnaðurin verður ikki upplýstur.

Sagt á annan hátt. Um ein HP telda kostar A og ein telda hjá einum kappingarneyta kostar B, so er neyðugt at A>(B+X%) fyri at B skal vinna.

**Góðska** skal verða á sama støði ella betur sum tey modell vit umbiðja. Vit eru greið yvir, at tá man samanber teldumodellir, so er ein vandi fyri at ymisku framleiðararnir ikki koyra somu tøknu/góðsku á sínar seriur, sum er á útgerðini hjá kappingarneytunum. Sum dømi kann nevnast, at um HP hevur "ein hentleika" í telduni, sum vit kallað "vanliga teldan", sum annar framleiðari einans hevur á sínari "high-end" seriu, so má hann bjóða inn við high-end telduni. Sagt á annan hátt - okkara krøv skulu skiljast sum minstu krøv.

### a. Undantak

Meginreglan er, at vit leggja okkum eftir at velja tann veitara sum hevur besta prís, góðsku og tøkni. Hinvegin, um tað vísir seg, at tað er lítil prís munur (t.e. 2%), og tað verður mett at verða fyrimunur at velja ikki tað bíligasta tilboð, so kann dómsnevndin taka avgerð um velja annað tilboð enn tað við flest stig. Dømi um tað kann vera leveringstreytir, góðska á vøruni, vørumerki, álit á vøruna ella líknandi.

## 7. Tillutan av sáttmála og endi á útboði

Sáttmálin verður tillutaður, tá ið útbjóðari hevur valt tilboðið.

Útbjóðari er ikki bundin til at taka av tilboðnum, sum hevur besta prís, og treytar sær rættin til at strika útboðið.

Útreiðslur, sum tilboðsgevarar hava í samband við hetta útboð, eru óviðkomandi fyri útbjóðara. Hetta er eisini galdandi um útbjóðari verður noyddur at strika útboðið.

| Virksemi | Dato, klokkutíð |
|---|---|
| Freist at senda inn spurningar, sbrt. pkt. 4.1. | mánadagin 17. august kl 12.00 |
| **Tilboðsfreist, sbrt. pkt. 5.1.** | **fríggjadagin 28. august kl 12.00** |
| Væntandi tillutan av sáttmála | 30. september 2026 |

| | |
|---|---|
| Væntandi undirskrift av sáttmála | 30. september 2026 |

Vit gleða okkum at fáa tykkara tilboð.

Vinaliga

Hallur Thomsen
Deildarleiðari